NR. 1, OKTOBER 2003

Almennar útreiðslur eftir myndugleika. Vísital 1998 = 100




# ALMENNA NÝTSLAN OG ALMENNAR ÚTREIÐSLUR

ALMENNA NÝTSLAN – KOSTNAÐURIN AV AT REKA ALMENNU TÆNASTURNAR

ALMENNU ÚTREIÐSLURNAR – HVAT FARA SKATTAKRÓNURNAR TIL

# Almenn nýtsla og almennar útreiðslur

*Fyribils uppgerð av tí almenna*

Uppgerðirnar, sum her verða vístar um almenna nýtslu og almennar útreiðslur, eru partur av tjóðarroknskapinum. Tjóðarroknskapurin allur verður útgivin um ársskiftið, men fyri at almenningurin skal fáa sum mest nyttu burtur úr hagtølunum, geva vit út fyribilsúrslitini, so hvørt tey koma fram. Í hesum føri er talan um fyribils uppgerð av tí almenna fyri árini 1998 til 2002.

*Altjóða sambærlig ár um ár*

Tað almenna verður í uppgerðunum hjá Hagstovuni avmarkað sambært altjóða uppgerðar-skránni System of National Accounts 1993 (SNA93). Tí ber til at samanbera uppgerðirnar ár um ár, og av tí sama er uppgerðin eisini sambærilig við líknandi uppgerðir hjá øðrum londum. Landskassaroknskapir og kommunuroknskapir ber ikki til at samanbera ár um ár ella við onnur lond, tí tað er so ymiskt, hvussu roknskapirnir verða gjørdir upp og hvat ið rokn-skapirnir umfata.

*Almennar fyritøkur eru ikki taldar uppí*

Sum forskriftin í SNA93 sigur, eru tær vinnufyritøkurnar sum tað almenna eigur, fluttar úr tí almenna. Rúsdrekkasølan, Apotekið, Strandfaraskip Landsins, partar av Landsverk-frøðinginum og IRF eru dømi um fyritøkur og fyritøkulíknandi stovnar, sum verða flutt úr uppgerðini av tí almenna. Varð hetta ikki gjørt, hevði verið ómøguligt at samanbera uppgerðir landanna millum og ár um ár, alt eftir um fyritøkurnar vóru einskildar ella ikki. Eitt nú liggur Apotekið summi ár í Landskassaroknskapinum og summi ár ikki.

*Roknskapir eru keldur*

Taltilfarið er roknskapirnir hjá landi, kommunum, almennum grunnum og ríkisstovnum. Størstu útreiðslurnar eru landsútreiðslurnar, kommunuútreiðslurnar eru tær næststørstu, meðan almennir grunnar og ríkisstovnar hava minsta partin av útreiðslunum.

*Landskassaroknskapur er gott taltilfar . . .*
*. . . kommunuroknskapir eru meira ivasamir*

Landskassaroknskapurin er ein greið uppseting av útreiðslunum, sum Løgtingið samtykkir, og hesi tølini eru Hagstovuni tøk longu um várið eftir roknskaparárið. Kommunuroknskapirnir harafturímóti koma Hagstovuni seint í hendi, eru ikki eins uppsettir, og einstøku útreiðslu-sløgini eru ikki greitt avmarkað. Taltilfarið frá kommunum er tí tann parturin, sum er mest svikaligur. Munurin millum hesa fyribils uppgerðina og endaliga tjóðarroknskapin kemst mest av, at samanlagda tilfarið frá kommununum verður broytt samsvarandi við aðrar upplýsingar og metingar.

*Almennar útreiðslur*

Almennar útreiðslur verða skiftar í:
- Almenna nýtslu
- Íløgur
- Veitingar
- Rentur

*Almenna nýtslan*

Almenna nýtslan er kostnaðurin av rakstrinum av at veita almennar tænastur. Almenna nýtslan verður skift á lønarútreiðslur, vøru- og tænastukeyp og avskrivingar. Haraftrat verða lagdar tær veitingar í feingi, sum tað almenna letur borgarunum, sum til dømis ískoytini frá Sjúkrakassanum. Hetta er eitt sonevnt realbúskaparligt býti, meðan býtið eisini kann gerast eftir virkisøki, sum í talvunum 15 til 17.

Almenna nýtslan er tað, sum vit vanliga meina við, tá vit tosa um kostnaðin av tí almenna. Hetta sigur okkum hvat tað kostar tí almenna at reka tænasturnar so sum fyrisiting, skúlaverk, heilsuverk og allar hinar tænasturnar.

*Millumlanda samanburður*

Í útgávuni er almenna nýtslan í Føroyum samanborin við almennu nýtsluna í Íslandi og í Danmark. Samanborin er almenna nýtslan sum partur av bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) og samanborin er almenna nýtslan roknað upp á íbúgvan.

*Almennu útreiðslurnar samanlagdar . . .*

Hinir partarnir av almennu útreiðslunum eru meira sjálvsagdir - almennar íløgur, rentu-gjaldingar og veitingar til borgarar, feløg og fyritøkur. Almennar íløgur eru tær flestu keyptar frá øðrum fyritøkum. Veitingarnar umfata allar almannaveitingar til

borgararnar og áhuga-feløg og rakstrarstudningar til vinnufyritøkur - bæði tær almennu fyritøkurnar og tær privatu fyritøkurnar. Kapital- og íløgustudningar hava vit í hesari uppgerðini lagt aftrat almennu íløguútreiðslunum.

*. . . eisini millumlanda samanbornar*

Almennu útreiðslurnar samanlagdar - tað er á realbúskaparlig sløg sum almenna nýtslu, íløguútreiðslur, rentugjaldingar og veitingar til borgarar og feløg - eru somuleiðis saman-bornar við Ísland og Danmark. Samanbornar eru almennu útreiðslurnar sum partur av tøku bruttotjóðarintøkuni (tBTI) og skiftið á einstaka realbúskaparliga slagið av útreiðslum.

*Virkisøkir í tí almenna*

Dømi um hvørji mál hoyra undir tey ymisku virkisøkini í tí almenna.

| | |
|---|---|
| Aðalfyrisiting: | Útinnandi og lóggávuvald, Fíggjarmálaráðið |
| Rættarmál: | Løgregla, Føroya Rættur |
| Vinnubúskaparlig mál: | Vinnumál, arbeiðsmarknaðarmál, flutningur og samskifti |
| Umhvørvisvernd: | Mál viðvíkjandi burturkasti og dálking |
| Íbúð og umhvørvi: | Íbúðamenning, vatnveiting og gøtuljós |
| Heilsumál: | Almenn sjúkraviðgerð, heilivágur, tól og útgerð |
| Mentamál: | Ítróttur, fjølmiðlar, átrúnaður og mentan annars |
| Undirvísingarmál: | Útbúgving á øllum stigum |
| Almannamál: | Sjúka og óarbeiðsføri, eldri, arbeiðsloysi og almannamál annars |
| Ikki flokkað: | Rentur og avskrivingar |

*Aðalráðini*

Aðalráðini eru tald við í tey málsøki, sum tey umsita. Sum dømi kann nevnast at í dag hoyrir Løgmálaráði undir Rættarmál, Vinnu-, Fiski- og Oljumálaráðið undir Vinnubúskaparlig mál, o.s.fr.

## Almenna nýtslan – kostnaðurin av at reka almennu tænasturnar

Almenna nýtslan er lønarkostnaðir og útreiðslur av vøru- og tænastukeypi. Haraftrat verða lagdar tær almannaveitingar í feingi, sum t.d. tann parturin sjúkrakassarnir gjalda fyri útreiðslurnar hjá einstaklingum. Avskrivingar verða lagdar aftrat, meðan borgaragjøld sum t.d. barnagarðsgjald verða drigin frá.
Almenna nýtslan, sum er nýtslan hjá landið, kommunum, almennum grunnum og ríkis-stovnum í Føroyum, er vaksin 790 milliónir frá 1998 til 2002. Hetta er 9 % vøkstur í miðal um árið. Av hesum eru lønirnar størsti parturin, og tær eru vaksnar 515 milliónir ella 8,7 % í miðal um árið.

**Talva 1.** **Almenn nýtsla í mió. kr.**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur | 1.306 | 1.404 | 1.526 | 1.645 | 1.821 |
| Vøru- og tænastukeyp | 535 | 585 | 648 | 701 | 791 |
| Søla | -110 | -123 | -147 | -154 | -174 |
| Avskrivingar | 128 | 140 | 152 | 166 | 175 |
| Almannaveitingar í feingi [1] | 73 | 80 | 91 | 98 | 108 |
| **Almenn nýtsla samanlagt** | **1.931** | **2.085** | **2.271** | **2.456** | **2.721** |

[1] Veitingar í feingi eru veitingar í “naturalium”

**Talva 2.** **Árlig og miðal % - broyting í almennu nýtsluni**

| | 1998 - 99 | 1999 - 00 | 2000 - 01 | 2001 - 02 | Miðal 1998 - 02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur | 7,5 | 8,7 | 7,8 | 10,7 | 8,7 |
| Vøru- og tænastukeyp | 9,4 | 10,8 | 8,1 | 12,9 | 10,3 |
| Søla | 11,6 | 19,0 | 5,2 | 12,8 | - |
| Avskrivingar | 9,0 | 8,7 | 9,6 | 5,4 | 8,2 |
| Almannaveitingar í feingi | 10,3 | 13,5 | 7,6 | 10,2 | 10,4 |
| **Almenn nýtsla samanlagt** | **8,0** | **8,9** | **8,2** | **10,8** | **9,0** |

**Talva 3.** **Almenn nýtsla eftir myndugleika í mió. kr.**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Heimastýrisfyrisitingin | 1.297 | 1.381 | 1.483 | 1.599 | 1.764 |
| Kommunurnar | 332 | 383 | 438 | 480 | 558 |
| Ríkisfyrisitingin | 94 | 95 | 100 | 106 | 110 |
| Sosialir grunnar | 80 | 87 | 98 | 105 | 114 |
| **Samanlagt uttan avskrivingar** | **1.803** | **1.946** | **2.119** | **2.290** | **2.546** |

Viðm.: Ríkisfyritigingin er t.d. Ríkisumboðið, Løgregla, Føroya Rættur og Fólkakirkja umframt beinleiðis veitingar til borgarar í Føroyum. Ríkisstovnarnir "Fiskeriinspektionen", "Flyvestation Thorshavn" og "Færøernes Kommando" eru ikki roknaðir sum fyrisiting í Føroyum.
Sosialir grunnar eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðaretfirlønargrunnurin og Sjúkrakassarnir

**Talva 4.** **Almenn nýtsla eftir myndugleika, árlig og miðal % - broyting**

| | 1998 - 99 | 1999 - 00 | 2000 - 01 | 2001 - 02 | Miðal 1998 - 02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Heimastýrisfyrisitingin | 6,5 | 7,4 | 7,8 | 10,4 | 8,0 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunurnar | 15,4 | 14,4 | 9,7 | 16,2 | 13,9 |
| Ríkisfyrisitingin | 1,3 | 5,3 | 6,1 | 3,5 | 4,0 |
| Sosialir grunnar | 8,7 | 12,0 | 7,1 | 8,8 | 9,1 |
| **Samanlagt uttan avskrivingar** | **7,9** | **8,9** | **8,1** | **11,2** | **9,0** |

Vanligt er at gera millumlanda samanburðir við at seta tøl í mun til bruttotjóðarúrtøkuna (BTÚ). Orsøkin er, at BTÚ er eitt sambærligt mát av bæði framleiðslu og inntøku í londunum.
Hjá okkum er kortini ikki so. Bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) mátar framleiðsluna í landinum, men er ikki eitt rætt mát av inntøkunum í landinum, tí í uttanlandsviðskiftinum fáa vit stórar upphæddir sum einvegis flyting úr Danmark. Tað eru ríkisveitingin og donsk gjøld fyri rakstur av ríkisstovnum í Føroyum.
Av hesi orsøk eiga vit at samanbera eitt nú almennar útreiðslur í mun til samanløgdu inntøkurnar í landinum, sum best verða mátaðar við tøku bruttotjóðarinntøkuni (tBTI). Eisini tá vit bera saman við onnur lond.
Í flestu londum er lítil munur á bruttotjóðarúrtøku og tøkari bruttotjóðarinntøku. Í nøkrum fáum londum er stórur munur á BTÚ og tBTI. Tað er serliga í londum, sum antin fáa munandi styrk uttaneftir (sum t.d. tilafturskomin lond) ella eiga munandi kapitalognir í útlondum (sum t.d. arabisku oljutjóðirnar), at tøka bruttotjóðarinntøkan er munandi størri enn bruttotjóðar-úrtøkan.
Bruttotjóðarúrtøkan er frægara mátið av tilfeingisnýtsluni, tí hon mátar framleiðsluna hjá landsins íbúgvum.
Tøka bruttotjóðarinntøkan er kortini frægara mátið av framboðnum av vørum og tænastum samanlagt og av tí inntøku, sum landsins borgarum er tøk til nýtslu.
Í uppgerðunum hava vit tí sett almennu nýtsluna í mun til BTÚ og bæði almennu nýtsluna og almennu útreiðslurnar í mun til tBTI.
At seta almennu nýtsluna í mun til BTÚ sigur okkum, hvussu nógv av framleiðslutilfeinginum vit brúka til at framleiða almennar tænastur burturúr. Restin av tilfeinginum varð brúkt til at framleiða til útflutnings, til húsarhaldsnýtslu ella íløgur.
At seta almenna nýtslu og almennu útreiðslurnar í mun til tBTI sigur okkum hvussu nógv av allari tøku inntøkuni vit brúktu til almennar útreiðslur. Restin av inntøkuni fór so til húsarhaldsnýtslu ella sparing.
At vit í mun til Danmark og Ísland brúka størri part av BTÚ til almennar tænastur (sí mynd 1) verður væl undirbygt av, at vit hava nógv størri tøka bruttotjóðarinntøku enn vit hava bruttotjóðarúrtøku. Meta vit so almennu útreiðslurnar í mun til tBTI, so sæst at vit brúka minni part enn Danmark og um leið sama part sum Ísland (sí mynd 5).

**Talva 5. Almenna nýtslan í Føroyum, Danmark og Íslandi í % av BTÚ**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 27,1 | 26,9 | 26,9 | 26,6 | 27,9 |
| Danmark | 24,7 | 25,8 | 25,3 | 25,9 | 26,1 |
| Ísland | 22,5 | 23,4 | 23,8 | 23,7 | 25,5 |

Kelda: Danmark, heimasíðan hjá Danmarks Statistik www.dst.dk,
Ísland, heimasíðan hjá Hagstofa Íslands www.hagstofa.is

**Mynd 1.** **Almenna nýtslan í Føroyum, Danmark og Íslandi í % av BTÚ**




**Talva 6.** **Almenna nýtslan í Føroyum, Danmark og Íslandi í % av tøku BTI**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 22,8 | 22,8 | 22,7 | 22,9 | 25,2 |
| Danmark | 25,4 | 26,7 | 26,5 | 26,8 | 27,1 |
| Ísland | 23,0 | 23,9 | 24,6 | 24,6 | 26,0 |

**Mynd 2.** **Almenna nýtslan í Føroyum, Danmark og Íslandi í % av tøku BTI**




**Talva 7.** **Almenna nýtslan í Føroyum, Danmark og Íslandi upp á íbúgvan, í 1998 - US $**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 6.332 | 6.903 | 7.403 | 7.870 | 8.581 |
| Danmark | 8.037 | 8.760 | 9.057 | 9.558 | 9.861 |
| Ísland | 6.561 | 7.225 | 7.898 | 8.714 | 9.719 |

**Mynd 3.** **Almenna nýtslan í Føroyum, Danmark og Íslandi upp á íbúgvan, í 1998 - US $**




**Talva 8.** **Almenna nýtslan í Føroyum, Danmark og Íslandi upp á íbúgvan. Árlig og miðal % - broyting**

| | 1998 - 99 | 1999 - 00 | 2000 - 01 | 2001 - 02 | Miðal 1998 - 02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 9,0 | 7,2 | 6,3 | 9,0 | 7,9 |
| Danmark | 9,0 | 3,4 | 5,5 | 3,2 | 5,2 |
| Ísland | 10,1 | 9,3 | 10,3 | 11,5 | 10,3 |

# Almennu útreiðslurnar – hvat fara skattakrónurnar til

Fyri at rokna allar almennu útreiðslurnar skulu vit aftrat almennu nýtsluni leggja rentu-útreiðslurnar, pengaveitingar, sum tað almenna letur húsarhaldum, fyritøkum og feløgum og haraftrat leggja almennu íløgurnar. Almenna nýtslan er størsti parturin av almennu útreiðslunum. Næststørsta útreiðslan eru almennu veitingarnar til húsarhald, fyritøkur og feløg.
Almennu útreiðslurnar eru vaksnar eina góða milliard hesi árini síðani 1998 ella 6,2 % í miðal um árið. Størsti vøksturin er í almennu nýtsluni – 790 milliónir ella 9 % í miðal um árið. Næststørsti vøksturin er í íløguútreiðslum, sum er 323 milliónir.
Í miðal eru almennu útreiðslurnar hesi árini 50 % av BTÚ.

**Talva 9. Almennar útreiðslur í mió. kr. og í % av BTÚ**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Almenn nýtsla | 1.931 | 2.085 | 2.271 | 2.456 | 2.721 |
| Renta og aðrar ognarútreiðslur | 428 | 299 | 289 | 262 | 237 |
| Almannaveitingar til húsarhald, fyritøkur, feløg o.a.[1] | 1.233 | 1.270 | 1.320 | 1.302 | 1.361 |
| Íløgur og aðrar kapitalútreiðslur | 240 | 320 | 396 | 436 | 563 |
| **Almennar útreiðslur samanlagt** | **3.832** | **3.974** | **4.276** | **4.457** | **4.883** |
| Í % av BTÚ | 53,8 | 51,2 | 50,7 | 48,2 | 50,1 |

[1] Upp í veitingar eru tald bæði almannaveitingar til borgarar, rakstrarstudningur til vinnulív og stuðul til áhugafeløg

**Talva 10. Almennar útreiðslur, árlig og miðal % - broyting**

| | 1998 - 99 | 1999 - 00 | 2000 - 01 | 2001 - 02 | Miðal 1998 - 02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Almenn nýtsla | 8,0 | 8,9 | 8,2 | 10,8 | 9,0 |
| Renta og aðrar ognarútreiðslur | -30,1 | -3,5 | -9,2 | -9,5 | -13,7 |
| Almannaveitingar til húsarhald, fyritøkur feløg o.a. | 3,0 | 4,0 | -1,4 | 4,5 | 2,5 |
| Íløgur og aðrar kapitalútreiðslur | 33,3 | 23,7 | 10,1 | 29,1 | 23,8 |
| **Almennar útreiðslur samanlagt** | **3,7** | **7,6** | **4,2** | **9,6** | **6,2** |

**Talva 11. Almennar útreiðslur eftir myndugleika í mió. kr.**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Heimastýrisfyrisitingin | 2.776 | 2.865 | 3.071 | 3.244 | 3.551 |
| Kommunurnar | 510 | 552 | 621 | 621 | 723 |
| Ríkisfyrisitingin | 205 | 206 | 215 | 219 | 223 |
| Sosialir grunnar | 213 | 212 | 217 | 206 | 211 |
| **Samanlagt uttan avskrivingar** | **3.704** | **3.835** | **4.124** | **4.290** | **4.708** |

Viðm. Ríkisfyritigingin er t.d. Ríkisumboðið, Løgregla, Føroya Rættur og Fólkakirkja umframt beinleiðis veitingar til borgarar í Føroyum. Ríkisstovnarnir "Fiskeriinspektionen", "Flyvestation Thorshavn" og "Færøernes Kommando" eru ikki roknaðir sum fyrisiting í Føroyum.
Sosialir grunnar eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin og Sjúkrakassarnir

**Talva 12. Almennar útreiðslur eftir myndugleika, árlig og miðal % - broyting**

| | Miðal |
|---|---|

| | 1998 - 99 | 1999 - 00 | 2000 - 01 | 2001 - 02 | 1998 - 02 |
|---|---|---|---|---|---|
| Heimastýrisfyrisitingin | 3,2 | 7,2 | 5,6 | 9,5 | 6,3 |
| Kommunurnar | 8,2 | 12,5 | 0,0 | 16,4 | 9,1 |
| Ríkisfyrisitingin | 0,6 | 4,2 | 2,1 | 1,7 | 2,1 |
| Sosialir grunnar | -0,4 | 2,5 | -5,0 | 2,1 | -0,2 |
| **Samanlagt uttan avskrivingar** | **3,5** | **7,5** | **4,0** | **9,7** | **6,2** |

**Talva 13. Almennar útreiðslur í Føroyum, Danmark og Íslandi í % av tøkari bruttotjóðarinntøku í 2002**

| | Føroyar | Danmark | Ísland |
|---|---|---|---|
| Almenn nýtsla | 25,2 | 27,1 | 26,0 |
| Renta o.a. ognarútreiðslur | 2,2 | 3,8 | 3,5 |
| Almannaveitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg | 12,6 | 23,0 | 10,4 |
| Íløgur o.a. kapitalútreiðslur | 5,2 | 2,2 | 5,3 |
| **Almennar útreiðslur samanlagt** | **45,3** | **56,1** | **45,2** |

**Mynd 4. Prosentbýti av almennu útreiðslunum í 2001**




**Talva 14. Almennar útreiðslur í % av tøkari bruttotjóðarinntøku í Føroyum, Danmark og Íslandi**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 45,2 | 43,5 | 42,7 | 41,6 | 45,3 |
| Danmark | 58,4 | 57,2 | 56,3 | 56,1 | 56,1 |
| Ísland | 41,7 | 42,6 | 42,6 | 43,8 | 45,2 |

**Mynd 5. Almennar útreiðslur samanlagt sum % av tøkari bruttotjóðarúrtøku**




**Talva 15 Almennar útreiðslur skiftar á virkisøki (COFOG) [1] í mió. kr.**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Aðalfyrisiting | 301 | 318 | 341 | 392 | 458 |
| Rættarmál | 84 | 89 | 94 | 116 | 116 |
| Vinnubúskaparlig mál | 348 | 421 | 485 | 497 | 628 |
| Umhvørvisvernd | 23 | 26 | 32 | 30 | 36 |
| Íbúð og umhvørvi | 31 | 42 | 50 | 43 | 53 |
| Heilsumál | 491 | 534 | 578 | 637 | 703 |
| Mentamál | 109 | 117 | 126 | 139 | 146 |
| Undirvísingarmál | 494 | 551 | 593 | 618 | 663 |
| Almannamál | 1.396 | 1.438 | 1.535 | 1.556 | 1.667 |
| Ikki flokkað | 556 | 439 | 441 | 429 | 413 |
| **Samanlagt** | **3.832** | **3.974** | **4.276** | **4.457** | **4.883** |

[1] COFOG stendir fyri "Classification of Functions of Government", ið er altjóða nummarskráin fyri flokking av tí almenna eftir virkisøki

**Talva 16. Almennar útreiðslur í % av samanløgdu útreiðslunum**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Aðalfyrisiting | 7,9 | 8,0 | 8,0 | 8,8 | 9,4 |
| Rættarmál | 2,2 | 2,2 | 2,2 | 2,6 | 2,4 |
| Vinnubúskaparlig mál | 9,1 | 10,6 | 11,4 | 11,2 | 12,9 |
| Umhvørvisvernd | 0,6 | 0,6 | 0,8 | 0,7 | 0,7 |
| Íbúð og umhvørvi | 0,8 | 1,1 | 1,2 | 1,0 | 1,1 |
| Heilsumál | 12,8 | 13,4 | 13,5 | 14,3 | 14,4 |
| Mentamál | 2,8 | 3,0 | 3,0 | 3,1 | 3,0 |
| Undirvísingarmál | 12,9 | 13,9 | 13,9 | 13,9 | 13,6 |
| Almannamál | 36,4 | 36,2 | 35,9 | 34,9 | 34,1 |
| Ikki flokkað | 14,5 | 11,0 | 10,3 | 9,6 | 8,5 |
| **Samanlagt** | **100,0** | **100,0** | **100,0** | **100,0** | **100,0** |

**Talva 17 Almennar útreiðslur skiftar á virkisøki. Vísital 1998 = 100**

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fyrisiting og rættarmál | 100 | 106 | 113 | 132 | 149 |
| Vinnu-, umhvørvis og byggimál | 100 | 121 | 141 | 142 | 178 |
| Heilsumál | 100 | 109 | 118 | 130 | 143 |
| Undirvísingar- og mentamál | 100 | 111 | 119 | 126 | 134 |
| Almannamál | 100 | 103 | 110 | 111 | 119 |

**Mynd 6.** **Almennar útreiðslur skiftar á virkisøki. Vísital 1998 = 100**




Viðm.:

| | |
|---|---|
| Aðalfyrisiting: | Útinnandi og lóggávuvald, Fíggjarmálaráðið |
| Rættarmál: | Løgregla, Føroya Rættur |
| Vinnubúskaparlig mál: | Vinnumál, arbeiðsmarknaðarmál, flutningur og samskifti |
| Umhvørvisvernd: | Mál viðvíkjandi burturkasti og dálking |
| Íbúð og umhvørvi: | Íbúðamenning, vatnveiting og gøtuljós |
| Heilsumál: | Almenn sjúkraviðgerð, heilivágur, tól og útgerð |
| Mentamál: | Ítróttur, fjølmiðlar, átrúnaður og mentan annars |
| Undirvísingarmál: | Útbúgving á øllum stigum |
| Almannamál: | Sjúka og óarbeiðsføri, eldri, arbeiðsloysi og almannamál annars |
| Ikki flokkað: | Rentur og avskrivingar |

Aðalráðini eru tald við í tey málsøki, sum tey umsita, sí dømi á síðu 3